Bøkur

# Havnar søga við íblástri úr Íslandi

**Hugskotið til bókarøðina Havnar Søga kyknaði á Akureyri í 1999 av stóra alskinum og virðingini, tey har sýndu síni egnu býarsøgu**

SØGA
*Leivur Hansen, fyrrv. borgarstjóri*



*Søgufrøðingarnir Jens Pauli A. Nolsøe og Kári Jespersen hava síðani summarið 2001 arbeitt burturav við Havnar søgu*

*Mynd: Bent Kjærbæk*

Um dagarnar komu út trý bind aftrat av Havnar søgu, og harvið eru fimm bind av hesum mikla bókaverki nú higartil sjósett í øllum góðum. Tvey tey fyrstu bindini komu í 2003, og eftir ætlanini kemur eitt bind aftrat, so tey samanlagt verða seks í tali.

Tá hava vit eitt samlað stórverk, sum vit øll – bæði havnarfólk og føroyingar sum heild - kunnu vera errin og stolt av, tí søgan røkkur eisini útum bøgarðarnar í Havn.

Bókaverkið lýsir Havnar søgu frá landnámi til okkara dagar.

Tvey tey fyrstu bindini lýsa Havnar søgu frá bóndagarðinum á Húsabrúgv í víkingatíð til Vágsbotnshandilin, Kongliga handilin og hvussu Havnin vaks og mentist fram til 1816.

Tey trý bindini, ið nú eru komin aftrat, flyta okkum í høvuðsheitum fram til 1909, tá Havnin gjørdist demokratisk kommuna og fór at virka eftir nútíðar grundsjónarmiðum um valrætt og vælbari.

Í teimum seinastu bindunum verður m.a. greitt frá grind í Havn fram til dagin í dag, Havnar traðasøgu og handli og vinnulívi.

Tað eru teir báðir søgufrøðingarnir Jens Pauli A. Nolsøe og Kári Jespersen, sum í samstarvi við eina ritstjóranevnd, hava lagt verkið til rættis.

Jens Pauli og Kári hava síðani á sumri 2001 arbeitt burturav við Havnar søgu, og ikki kann annað sigast enn, at hesum eru teir komnir sera væl frá - á øllum økjum. Tillukku við tí, tit báðir!

## Upprunin til verkætlanina

Nakrar royndir hava gjøgnum tíðirnar verið gjørdar til tess at fáa skrivað Havnar søgu, men ikki fyrrenn í 1999 kom verulig gongd á, og árið eftir eydnaðist á fyrsta sinni at fáa sett pengar av til endamálið á fíggjarætlan kommununnar.

Hetta hevur síðani verið ein føst játtan á ársfíggjarætlanini nú í 10 ár. Sostatt er verkætlanin vorðin nógv drúgvari, enn roknað var við upprunaliga, men ongum kom tá til hugs, hvussu stór henda avbjóðingin í roynd og veru var.

Í sambandi við, at vit nú fagna teimum trimum nýggjastu bindunum, hevur tað kanska áhuga hjá onkrum lesara at hoyra eitt sindur nærri um, hvussu hetta megnarverk í grundini varð til.

Søgan er í stuttum henda:

Í januar 1999 var undirrritaði – sum táverandi borgarstjóri í Havn – boðin til Akureyrar at vera við til setanina av eini forkunnugari føroyskari listaframsýning, sum Listafelag Føroya var við til at fyriskipa.

Henda framsýning varð frammanundan stórliga fagnað á Kjarvalsstøðum í Reykjavík - har eg eisini var hjástaddur og enntá fekk heiðurin at halda setanarrøðuna.

## Fekk íblástur á Akureyri

Dvølurin á Akureyri gjørdist bæði mennandi og spennandi og skuldi vísa seg at fáa stóran týdning fyri bókarøðina um Havnina, tí tað var júst har, hugskotið til bókarøðina kyknaði.

Undir setanini á Akureyri vóru tey so blíð og beinasom at handa mær eitt bind av Akureyrar søgu sum tøkk fyri hjáveru mína. Hetta var fyrsta bindið í eini røð av trimum, sum býráðið á Akureyri hevði sett ein av sínum býarsynum – ein virdan rithøvund – at skriva.

Talan var um eina miljóna verkætlan, ið røkk yvir fleiri ár, og sum rithøvundurin burturav skuldi halga seg til fyri býarins rokning – hvørki meira ella minni.

Ja, so stóran alsk og virðing høvdu tey fyri søguni har yviri!

Tú kundi ikki annað enn verða ávirkaður av hesum stórsinnaða hugburði, samstundis sum tú iðraði teg ikki sørt um ikki at kunna handa teimum eina líknandi gávu frá Tórshavnar býi.

Hetta gav bæði mær og mentanardeildarleiðaranum, ið var við mær har yviri, nakað at hugsa um. Og báðir vóru vit sannførdir um, at bar hetta til hjá teimum, so bar hetta sanniliga eisini til hjá okkum.

Sostatt var hetta í roynd og veru tað, sum ikki bara gav íblástur til at fara undir hetta takið her heima, men sum avgjørt eisini skundaði undir tað. Og nú ráddi so eisini um at smíða, meðan jarnið var heitt.

## Tung og krevjandi uppgáva

Heimafturkomnir fóru vit beinanvegin undir at kanna, hvør ið møguliga kundi átaka sær hesa uppgávu, men hetta vísti seg skjótt at vera lættari sagt enn gjørt.

Hóast nógvir góðir pennar vórðu spurdir, aftraðu allir seg við at átaka sær hesa tungu og krevjandi uppgávu. Vit vildu tó ikki geva skarvin yvir, men royndu aðrar leiðir.

Endin gjørdist tann, at avgjørt varð at seta eina ritstjóranevnd at skipa fyri tilrættisleggingini. Eg traðki neyvan nakran av nevndarlimunum á tærnar við at upplýsa, at í hesa nevnd komu fleiri av teimum, sum ikki hættaðu sær at fara undir hetta stórverk einsamallir.

Betri nevndarsamanseting kundu vit neyvan fingið, so tøkk fái tit fimm: Annfinnur í Skála, Jógvan Arge, Andras Mortensen, Bárður Jákupsson og Gunnar Hoydal.

Ritstjóranevndin fekk í lag heppið samstarv við søgufrøðingarnar Jens Paula Nolsøe og Kára Jespersen, sum aftaná stutta umhugsunartíð, tíbetur játtaðu at átaka sær uppgávuna. Takk enn einaferð fyri tað, tit báðir.

Til stuttleika kann verða nevnt, at vitjanin á Akureyri ikki bert var ein kveikjan og eggjan til at fáa Havnar søgu skrivaða. Hon gav eisini íblástur til mangt annað. Tildømis stavar avgerðin um at skipa Tórsgøtu sum mentanargøtu í stóran mun eisini frá hesum túri.

Jú, víst hava vit nógv at takka og læra av søguríku og mentanarfúsu frændum okkara fyri norðan!

At enda fari eg at takka leiðaranum á mentanardeildini, táverandi kommunustjóra og býráðslimum fyri dyggu undirtøkuna í burðartíðini hjá Havnar søgu – og tey, ið tóku við, har onnur sleptu, fáa somu heilsan.

Takk fyri øll somul og hjartaliga tillukku við hesum megnarverki við ynskjum um eini gleðilig jól og eitt eydnuríkt nýggjár!